# er beinleiðis kappingaravlagandi

rættuliga nýggj í nevndini fyri Mentanargrunn Landsins. Hon kom í nevndina tíðliga í fjør, verður upplýst av skrivstovu grunnsins. Eg spyrji meg sjálvan, um hon ikki er ógegnig til eitt ummæli. Hon skal helst vera loyal móti leiðslu grunnsins. Í fjør hevði Mentanargrunnur Landsins longu pumpað 28 mánaðlønir ella umleið 560.000 krónur í skaldsøguna "Ó" hjá Carl Johan Jensen. Í januar í ár er Malan Marnersdóttir við at geva Carl Johan eina ársløn afturat ella 264.000 krónur, sum takk fyri góðu bókina hann gav út undan jólum. Um Malan Marnersdóttir hevði elt fótasporini hjá Carl Johan og kom við einum niðursáplandi ummæli í Kulturu undan jólum, so hevði hon eisini komið við einum lemjandi kritikki av arbeiðinum hjá Róa Patursson sum formanni og Hanus undir Leitinum sum næstformanni í Mentanargrunni Landsins seinastu mongu árini. Eg skal ikki siga, at Malan Marnersdóttir ikki hevur loyvi at dáma bøkurnar hjá Carl Johan Jensen, sjálvandi hevur hon tað, tó hevði tað verið meira passandi, at hon helt seg burtur sum ummælari av júst hesi bók.

Vent hinvegin, skuldi ein nevndarlimur fyri Norðoyar Sparikassa ella Eyðfinn Reyðberg, stjóri, sjálvur ummælt mínar bøkur, so hevði tað sæð løgið út um teir høvdu sáplað tær niður, tí tað hevði víst, at teir ikki høvdu serliga góð metingarevnir av mær sum persóni, áðrenn eg fór undir at skriva, og tað kundi í seinna enda kosta teimum pening, tí teir hava fíggja mínar bøkur í nógv mestan mun við lántøku og við eitt sindur av stuðli

### Siðsøgan við skerdan lut

Hyggja vit í yvirlitið yvir tey sum hava fingið játtað pening úr Mentanargrunni Landsins, so sæst týðuliga, at siðsøga ikki kemur undir endamálsorðing grunnsins í grein 1. "at styðja starv fyri føroyskum máli, bókmentum, list, vísindum og øðrum mentanarmálum bæði hjá leikum og lærdum."

Tann einasti, sum er á játtanarlistanum, sum eisini hevur roynt seg við siðsøgu er Hanus Kamban. Hann hevur skrivað um Janus og umframt bókmentaligar útgreiningar, so eru hansara tíðarmyndir siðsøga. Eg havi sjálvur valt eitt heilt skeivt evni til at kunna koma undir veingir grunnsins. Eg skrivi um ein skipara, hann er ikki eingang úr Havnini, hann hoyrir allarhelst undir eina skeiva samkomu, hansara eftirkomarar eru allarhelst alt ov ríkir. Hann er í hvussu er uttanfyri alt tað sum nevndin í Mentanargrunni Landsins finnir verdugt at stuðla við starvslønum. Ikki eingang við einari tí einastu.

Tá ið viðurskiftini hanga soleiðis saman, so tori eg næstan at siga fyri aðrar eisini sum skriva siðsøgu, at vit høvdu verið betri staddir um Mentanargrunnur Landsins varð avtikin. Í løtuni er hann beinleiðis kappingaravlagandi, tí tað eru somu fólk sum keypa okkara bøkur, sum eisini keypa bøkur stuðlaðar í ólukkumát við almennum pengum úr grunninum. Tosið eg ikki fyri allar siðsøguligar rithøvundar, so tosi eg í hvussu er fyri meg sjálvan. Hevði eg av illum fingið bara eina mánaðarløn sum eina viðurkenning um ikki annað. Ella tvær sum Ólvur í Beiti í 2001 ella átta mánaðar, eins og Jens Pauli Heinesen hevur fingið. Hann hevur ríkað føroyskar bókmentir við óteljandi bókum. Ein maður sum Jógvan Arge, sum hevur skrivað nógvar siðsøguligar bøkur er heldur ikki at síggja á listanum.

Hvat er tað sum fær meg at skriva hetta. Er tað ein farri av øvund, ella eitt róp um órættvísi. Eg haldi bæði. Míni bókhaldstøl høvdu sæð vøkur út, hevði eg fingið somu vælvild sum Carl Johan Jensen og eg haldi tað er beinleiðis órættvíst, at rithøvundar, sum burturav liva av sínum rithøvundayrki, heilar seks ferðir verða afturvístir av Mentanargrunni Landsins, tá ruggar okkurt ikki rætt. Og tá ger nevndin neyvan sínar skyldur. Ein rithøvundur, sum onki annað starv hevur, men sum halgar alla sína tíð til rithøvundavirksemi hevur annað uppiborið enn einn fotokopierað hópsvar frá Róa Patursyni.

Tølini frammanfyri sýna, at eg skal selja nógvar ferðir fleiri bøkur enn Carl Johan Jensen fyri at fáa roknistykkið at ganga upp. Tað merkir at eg havi styttri stundir til at skriva, tí søluarbeiðið fer av stað við trimum knallhørðum arbeiðsmánaðum seinast í árinum Eg veri eisini av fíggjarligum ávum tvungin at geva út á hvørjum ári, fyri at fáa endarnar at røkka saman, eg havi ikki ráð til at nýta fleiri ár til eina bók, eins og teir sum eru inni í hitanum hjá nevnd Mentanargrunni Landsins.

*justinus(kurla)post.olivant.fo*

**Tey, ið fingu starvsløn**
(skipað í stavrað eftir fornavni)

| Navn | 2001 | 2002 | 2003 | 2004 | 2005 | 2006 | 2007 | 2008 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Aggi Á. Ásgeirsdóttir | | | | 3 mðr | 1 ár | | | 15 |
| Alexandur Kristiansen | 3 ár | | | | | | | 36 |
| Andrias Andreassen | | | 1 ár | | | | | 1 |
| Anker Mortensen | | | | 6 mðr | | 3 mðr | | 9 |
| Astri Luihn | | | 2 mðr | 4 mðr | | 6 mðr | | 12 |
| Astrid Andreasen | | 2 mðr | 2 mðr | | | 2 mðr | | 6 |
| Atli Kárason Petersen | | | 2 mðr | | | | | 2 |
| Bárður Oskarsson | | | | 3 mðr | | | | 3 |
| Bárður Persson | | | | | | 2 mðr | | 2 |
| Berghild Poulsen | | 1 mð | | | | | | 1 |
| Búi Egason Dam | | | | | 1 mð | | | 1 |
| Carl Jóhan Jensen | 6 mðr | 1 ár | 4 mðr | | 6 mðr | 1 ár | | 70 |
| Dánial Hoydal | 2 mðr | | | | | | | 2 |
| Edvard Nyholm Debess | | | 2 mðr | 2 mðr | | | | 4 |
| Edward Fuglø | | 6 mðr | | | | 6 mðr | | 12 |
| Eyð Matras | | | | 2 mðr | | | | 2 |
| Eyðun Eliasen | 3 mðr | | | | | | | 3 |
| Finnur Hansen | | | | 1 mð | | | | 1 |
| Guðrið Poulsen | 3 mðr | 2 mðr | 2 mðr | | | 2 mðr | | 9 |
| Hanni J. Bjartalíð | | | | | 3 mðr | | | 3 |
| Hans Egholm | | 2 mðr | | 1 mð | | 3 mðr | | 6 |
| Hans Petur í Brekkunum | | | 2 mðr | | | | | 2 |
| Hans Tórgarð | | 3 mðr | | | | | | 3 |
| Hansina Maria Iversen | | | | | 6 mðr | | | 6 |
| Hanus G. Johansen | | | | | 2 mðr | | | 2 |
| Hanus Kamban | 1 ár | | | 1 ár | | 3 mðr | | 27 |
| Heðin Ziska Davidsen | | | | | 1 mð | | | 1 |
| Heri Joensen | | | | | | 3 mðr | | 3 |
| Hjørdis Johansen | | | | 1 mð | | | | 1 |
| Ingi Joensen | | | | | | 3 mðr | | 3 |
| J.P. Gregoriussen | | | 2 mðr | | | | | 2 |
| Jens Pauli Heinesen | | | 4 mðr | 2 mðr | 2 mðr | | | 8 |
| Jóan Jakku Guttesen | | | 1 mð | | | | | 1 |
| Jóanes Nielsen | | 6 mðr | 6 mðr | 6 mðr | | 6 mðr | | 24 |
| Jógvan S. Biskopstø | | | | 2 mðr | | | | 2 |
| Jóhannes Andreasen | 1 ár | | | | | | | 12 |
| Kári Bæk | | | 2 mðr | | 4 mðr | | | 6 |
| Kári Sverrisson | 3 mðr | 2 mðr | 1 mð | 2 mðr | | | | 8 |
| Karstin Olgar Lamhauge | | | | | | 3 ár | | 36 |
| Katarina Nolsøe | | 3 mðr | | | | | | 3 |
| Katrin Ottarsdóttir | | 6 mðr | | | | | | 6 |
| Kim Simonsen | | | 1 mð | | | | | 1 |
| Kinna Poulsen | 2 mðr | 2 mðr | | | | | | 4 |
| Kristian Blak | | | 3 ár | | | | | 36 |
| Kristina Sundar Hansen | | | | | 2 mðr | | | 2 |
| Leivur Thomsen | | | 1 mð | | | | | 1 |
| Marianna Mørkøre | | | | | | 3 mðr | | 3 |
| Marianne Clausen | | | 1 ár | 6 mðr | 3 mðr | | | 21 |
| Marita Nattestad | | | | | | 2 mðr | | 2 |
| Marius Olsen | 3 mðr | | | | 3 mðr | | | 6 |
| Marjun S. Kjelnæs | | 4 mðr | 2 mðr | 4 mðr | | | | 10 |
| Nikolaos Kapnas | | | 2 mðr | | | | | 2 |
| Oddfríður M. Rasmussen | 3 mðr | 6 mðr | 2 mðr | 3 mðr | | | | 14 |
| Oddvør Johansen | | | 2 mðr | | | 1 mð | | 2 |
| Ólavur í Beiti | 2 mðr | | | | | | | 2 |
| Óli Olsen | | 2 mðr | | | | | | 2 |
| Pauli í Sandagerði | | | 1 mð | | | | | 1 |
| Petur Elias A. Guttesen | | | 1 mð | | 6 mðr | | | 7 |
| Petur Pólsson Jensen | | | 2 mðr | | | | | 2 |
| Philippe Carré | 2 mðr | | | | | | | 2 |
| Rakel Helmsdal | 3 mðr | 4 mðr | 2 mðr | | 3 ár | | | 45 |
| Rannvá Holm Mortensen | | | 2 mðr | 4 mðr | | 2 mðr | | 8 |
| Rannvá Kunoy | | | 3 mðr | 3 ár | | | | 39 |
| Ria Tórgarð | | | | | 1 mð | | | 1 |
| Rógvi á Rógvu | | | 1 mð | | | | | 1 |
| Sámal Petersen | | 2 mðr | | | | | | 2 |
| Sámal Ravnsfjall | | | 1 mð | | | | | 1 |
| Sanna Waagstein í Brekkunum | | | 1 mð | | | | | 1 |
| Sigri Mitra Gaïni | | | | | | 2 mðr | | |
| Sigrun G. Niclasen | 3 mðr | | 2 mðr | | | 6 mðr | | 11 |
| Stamen Stanchev | 3 mðr | | | | | | | 3 |
| Steintór Rasmussen | | | | 3 mðr | | | | 3 |
| Sunleif Rasmussen | 6 mðr | 1 ár | 2 mðr | 3 mðr | 4 mðr | 6 mðr | | 33 |
| Súsanna Tórgarð | | | | | 1 mð | 2 mðr | | |
| Teitur Árnason | | 3 ár | | | | | | 36 |
| Tita Vinther | 3 mðr | 2 mðr | | | | 2 mðr | | |
| Tóroddur Poulsen | | | 3 mðr | 6 mðr | | 3 mðr | | 12 |
| Tróndur Bogason Hansen | | | | | 1 ár | | | 12 |
| Uni Reinert Debess | | | | | | 1 mð | | 1 |
| Unn Paturson | | | 1 mð | | | | | 1 |
| Vígdis Petersen | | | | 6 mðr | | | | 6 |
| Aase Bømler Olsen | | | 2 mðr | | | | | 2 |